gult34 cyan34 magenta34 svart34



# HEILSANIR



**Sjúrður, Torkil og lítli Sjúrður**
Góði abbi, babba og beiggi, hjartaliga tillukku við føðingardøgunum 28. mai, 11. og 24. juni.
**Bestu ynskir frá okkum báðum, Eydna**



**Góða omma**
Hjartaliga tillukku við 65 ára føðingardegnum. Alt tað besta í framtíðini.
**Ynskja vit øll, Sunniva**



**Góða elskaða dóttur og systir**
Hjartaliga tillukku við 18 ára føðingardegnum í morgin. Ja, nú er tú blivin vaksin og koyrikortið er á veg. Alt tað besta í framtíðini. Vit elska teg.
**Ynskja mamma, Sverri, Gerda, Hans Pauli og Sunniva**



**Hej smukke**
Hjartaliga tillukku við teimum hálvt hundrað.
**Bestu heilsanir systir tín og svágur**



**Góða mostir**
Her ert tú prikkut og lekkur. Tillukku við 50 ára degnum.
**Anita**



**Góða Katrin**
Hjartaliga tillukku við 50 ára degnum. Alt tað besta í framtíðini.
**Ynskir mamma tín**



**Góðu Elin og Erla**
Tillukku við 7 og 12 ára føðingardøgunum 22. apríl og 8. juni. Jesus pápi signi framtíð tykkara.
**Ynskja mamma, pápi og systkin**



**Hey tit bæði**
Tillukku við silvurbrúdleypsdegnum tann 12. juni. Vit vóna tit hava eina góða feriu. Alt tað besta.
**Ynskja børnini og Kai**



**Góða fitta Miriam**
Hjartaliga tillukku við 9 ára føðingardegnum 9. juni.
**Ynskja mamma, babba, Maiken og Bjørt**



**Elskaði Dávur!**
Endiliga kom dagurin! Nú ert tú 6 ár – hjartaliga tillukku við degnum og alt gott ynskist tær.
**Heilsan mamma, babba, Bárður og Ingi**



**Elskaði Dávur!**
Hjartaliga tillukku á 6 ára føðingardegi tínum 9. juni og bestu ynskir fyri framtíð tína.
**Heilsan omma og abbi í Grønulíð**



**Góða mostir**
Hjartaliga tillukku við degnum. Her er tú ung!
**Heilsan Durita**



Hjartans tøkk senda vit øllum tykkum sum við blómum, fjarritum og á annan hátt gleddu okkum á hjúnabandsdegnum 14.12.2000.
**Heilsan Eileen og Gudmund**

## Heilsanir

30,- kr. Sosialurin

**5 ferðir um vikuna**

### Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑ Leygard.

Tekstur:.....................................................................
..................................................................................
..................................................................................
..................................................................................
..................................................................................
..................................................................................

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.

Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: .......................................................................
Bústaður: ..................................................................
Bygd/býur: ................................... Tlf.: .................

Sendið lepan, mynd og gjald til:
**Sosialurin**
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: »**Heilsanir**«

gult35 cyan35 magenta35 svart35



# TILTØK

## FØÐINGAR

27. mai fingu Nita Davidsen og Urbanus K. Olsen, Keypmannahavn, eina dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 3750 gr.

31. mai fingu Marita Sivertsen og Vilhelm Hansen, Norðdepil, ein son. Hann var 51 cm. langur og vigaði 3500 gr.

31. mai fingu Gunnvør og Peter Kjeldsen, Tórshavn, ein son. Hann var 49 cm. langur og vigaði 2890 gr.

31. mai fingu Rósmari og Jack Petersen, Eiði, eina dóttur. Hon var 51 cm. long og vigaði 3450 gr.

1. juni fingu Tordis Zachariasen og Olaf Ellingsgaard, Tórshavn, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 4250 gr.

1. juni fingu Berit og Birgir Olsen, Skála, ein son. Hann var 40 cm. langur og vigaði 1440 gr.

2. juni fingu Anny Grettirsdóttir og Eyðolvur Joensen, Hósvík, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 3900 gr.

2. juni fingu Jákup Danielsen og Súsan Vestergaard, Hvítanes, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 4000 gr.

2. juni fingu Rúna Á. Egholm og Chris H. Nielsen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 51 cm. long og vigaði 3200 gr.

4. juni fingu Hanna og Svenn Olsen, Syðrugøta, eina dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 3900 gr.

5. juni fingu Miriam Mikkelsen og Jens Petur Bærentsen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 53 cm. long ov vigaði 3550 gr.

## ANDLÁT

**31.mai**
Jóhanna Kathrina Clementsen í Tórshavn, 79 ár.

**03. juni**
Petra Louisa Nielsen, fødd Lervik, 92 ár.
Alvilda Christiansen, í Fuglafirði, 87 ár.
Emma Joensen, fødd Simonsen, í Saltangará, 96 ár.

**05. juni**
Karstin Hansen, Klaksvík, vanliga nevndur Karstin í Svínoy, 80 ár.
Katrina Jacobsen, fødd Enni, 86 ár.

## LÆKNAVAKTIR

*Tórshavn:*
Læknavaktin tlf. 310033

*Eysturoy:*
Leygard. 9. juni: Hálvdan Simonsen, tlf. 441490
Sunnud. 10. juni: Sverri Lamhauge, tlf. 448016

*Norðoyggjar:*
Læknavaktin tlf. 458888

*Vágar:* tlf. 332413

*Suðuroy* (norður): tlf. 371560
*Suðuroy* (suður): tlf. 373030

*Tannlæknavakt, Tórshavn*
Bráðfeingishjálp fæst leygardag, sunnudag og halgidagar kl. 13-14. Tlf. 314544.

### Gudstænastur
***Trinitatis sunnudagur***
*Christianskirkjan:* kl. 11, Hans Eiler Hammer
*Fríðrikskirkjan:* kl. 11, altarg., Kjartan Mørkøre
*Glyvrar:* kl. 11, Meinhard Bjartalíð
*Havnar kirkja:* kl. 11, Sonja Klein
*Norðskála:* kl. 17, altarg., Peter O. K. Olofson. Kirkjukaffi aftaná
*Hósvík:* kl. 11, Marjun Bæk
*Kollafjørður:* kl. 11, Martin R. Jacobsen
*Kvívík:* kl. 12, Inga Poulsen Dam
*Funningur:* kl. 11 messa,
*Gjógv:* kl. 12.30 messa,
*Eiði:* kl. 14.30 barnagudstænasta, Emil Olsen
*Viðareiði:* kl. 11, Elsa Funding
*Sandvík:* kl. 12, Ólavur Rasmussen
*Tvøroyri:* kl. 11, Petur M. Rasmussen
*Vesturkirkjan:* kl. 11, Heri Joensen
*Leirvík:* kl. 11, altarg., Uni Næs
*Skúvoy:* kl. 12, Jákup Reinert Hansen
*Vestmanna:* kl. 11, Bjarni Bæk

### Meinigheitin í Hoyvík
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 17.30 bøn og kl. 18 møti. Øll eru vælkomin.

### Rhema á Hálsi
Leygarkvøldið kl. 20 ungdómsmøti, sunnudagin kl. 11 møti og sunnudagsskúli.

### Ebenezer
Sunnudagin kl. 10 breyðbróting, kl. 12 sunnudagsskúli, kl. 18 evangeliskt møti, kl. 21 útimøti.

### Frelsunarherurin, Tórshavn
Leygardagin kl. 11 útimøti. Sunnudagin kl. 11 møti við Palla Petersen, kl. 18 møti, major Inger Sofie Tjåland talar.

### Aglow
Fundur verður í hølunum hjá Frelsunarherinum leygarkvøldið kl. 19.30, allar kvinnur eru vælkomnar.

### Katólska kirkjan
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Orðsinstænasta við kommunión í Kerit.
Hóskvøldið kl. 20 verður Taizé-kvøld (bønarstund við sálmasangi úr Taizé) í bønarrúminum hjá Franciskanasystrunum, Varðagøta 16. Øll eru vælkomin.
Leygardagin kl. 11.30 Orðsinstænasta við kommunión í Kerit.
Sunnudagin kl. 11 Orðsinstænasta v/kommunión í Kerit. Sunnudagsskúlin verður kl. 14.

### KFUM og KFUK í Havn
Mánadagin kl. 15 í KFUK: Eldrasamkoman við Johnny Johannesen.

### Filadelfia, Landavegur 22
Í dag kl. 17 landsbøn.
Í morgin kl. 11 morgunmøti við Tummas Jacobsen, kl. 18 kvøldmøti við Tummas Jacobsen, kl. 22 útimøti við Filadelfia.
Mánakvøldið kl. 20 bønarskúlin.
Møtiskráin hjá Filadelfia sæst á heimasíðu okkara: www.filadelfia.fo

### Meinigheitshúsið
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 18 familjumøti við Birgit og Niels Juul Olsen.

### Hvítusunnusamkoman Yviri við Strond
Sunnudagin kl. 11 morgunmøti, kl. 12.15 sunnudagsskúli, kl. 18 evangeliskt møti.

### Samkoman Immanuel
Sunnudagin kl. 13 sunnudagsskúli, sunnukvøldið kl. 17 møti.

### Kirkju- og missiónshúsið á Argjum
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli og Junior, kl. 17.30 bønarløta, kl. 18 møti við Høgna Poulsen og Mariu Hansen.
Mánakvøldið kl. 20 ungdómsmøti við Ingolf Johannesen.
Mikumorgunin kl. 07 bønarløta.
Hóskvøldið kl. 20 bíbliutími við Bergi D. Joensen, evni: Bøn til hin livandi Gud: Ef. 1, 15-23.
Heimasíða okkara: www.koma.fo

### Vestmanna Missiónshús
Sunnudagin kl. 14.30 sunnudagsskúli, kl. 18 møti við Niklas Mikkelsen úr Gøtu.

### Saron, Vestmanna
Sunnudagin kl. 11 morgunmøti.
Mánakvøldið kl. 20 bønarmøti.

### Útimøti
Heimamissiónin hevur útimøti komandi sunnudag kl. 17.00 í Haldarsvík og kl. 19.00 í Tjørnuvík við sangbólkinum Gittit o.ø.

### Filadelfia, Sundalagið
Í annaðkvøld kl. 18 kvøldmøti við Sam Jacobsen.
Mikudagin kl. 17.30-19.30 Miðdepilin.

### Keldan, Skálafirði
Opið hús leygarkvøldið kl. 21 við Paula Høj.
Um viðrar sunnudagin verður útferð fyri meinigheitini, havið okkurt drekkandi við, farið verður frá Kelduni kl. 10.
Sunnudagin kl. 17 møti við Arni Abrahamsen og onnur, barnamøti kl. 17.
www.keldan.fo

### Ørkin, Saltangará
Einki møti verður sunnudagin. Sí lýsing aðra staðir.
Húsmøti verður týskvøldið kl. 19 hjá Jonnu og Palla Højgård, Gerðisvegur, Saltangará.

### Missións- og Ungdómshúsið á Glyvrum
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli og kl. 19 møti.
Øll eru vælkomin.

### Losjan í Gøtu – Samkoman Ørkin
Evangeliskt møti verður í Losjuni í Gøtu sunnukvøldið kl. 20 við talu, sangi og vitnisburði. Eisini verður duetsangur á skránni. Møguleiki verður at fáa forbøn. Verið hjartaliga vælkomin.

### Missiónshúsið í Leirvík
Í kvøld kl. 20 verður ungdómsmøti við Reimund Langgaard o.fl. Aftaná verður drekkamunnur.
Sunnukvøldið kl. 19 verður møti við Hanus Poulsen. Øll eru vælkomin.

### Soli Deo Gloria
Mikumorgunin kl. 06 bøn, kl. 20 samlast tey, sum ynskja at syngja lovsang í Vágstúni á Norðoyarstevnu.
Sunnudagin ongin sunnudagsskúli, kl. 18 er møti, Hjalgrím Davidsen talar.

### Sands Missiónshús
Sunnudagsskúlin er nú kl. 10.30 á morgni. Møti kl. 18. Tú ert vælkomin.

## EITT LJÓS Á GØTU MÍNI

Latum okkum í dag líta eitt sindur at »hini Heilagu Trúarjáttan«. Doypi tey til navns Faðirins, sonarins og hin heilaga Anda«. Her hava vit ein av grundstuðlunum undir allari kristintrúgv. Hin tríeiniga Guð, og læruna um hann.

Tá vit signa okkum ella onnur, tá nevna vit eisini hin tríeiniga Guð. Í navni Guðs Faðirs, sonar og Heilaga Anda. Signingin verður hildin vera ein av elstu bønunum í kristnu trúnni og hon er eisini ein staðfesting á tí, at vit eru halgaði til Jesus Krist, hin krossfesta og upprisna. Til hansara eru vit doypt, og soleiðis er ynski hansara eisini at vit, hvør einstakur, er ogn hansara á lívi eins væl og í deyða.

Signingin er ein stutt og vøkur bøn, sum vit helst áttu at brúkt meira enn vit gera, og lært okkara børn hitt sama. At signa seg og síni var ein sjálvsagdur siðaarvur hjá okkara fólki, har eitt ynski liggur um at hava Guð við bæði til Fjasl og Fjøru, í øllum lívsins viðurskiftum.

Tá vit hoyra og taka undir við trúarjáttanini, leggja vit til merkis at hon er trískift. Og hvør liður byrjar við orðunum. Eg trúgvi 1) Fyrst. Eg trúgvi á Guð Faðir 2) Síðani Eg trúgvi á Jesus Krist Guds einborna son. Og til síðst 3) Eg trúgvi á Heilagan Anda. Hesir tríggir liðir mynda tríeinigheitina. Og tað var hendan Guð, Jesus álegði lærusveinum sínum at boða um allan heimin. Síðan fór hann frá teimum, og teir fóru við ábyrgd undir Missiónsarbeiðið.

Soleiðis at tríeinigheitslæran er grundin undir øllum sonnum kristindómi og øllum tí, sum signað verður við Guðs heilaga navni. Í morgin er tríeinigheits sunnudagur.

Jesus segði eisini: »Elskar nakar meg, tá varðveitir hann orð mítt og faðir mín skal elska hann, og vit skulu kenna til hansara og gera okkum bústað hjá honum«. Aftur hin heilaga tríeinigheit. Faðirin og sonurin skulu koma sum heilagur Andi og búgva hjá teimum sum elska og trúgva á Jesus Krist.

Tær Guð, sum ein ræður himni á,
veri lov og tøkk fyri náði;
tú hjálp tína veitir okkum, tá
her mestur er syndaváði!
Til jarðar tú sendir fragd og frið,
og menniskjan øll má fegnast við
tín tokka og blíði tína.

Amen